## Minningarorð um

# Mikkjal Sjúrð Olsen

**føddur 05.10.1958 deyður 06.11.2001**



Tað kom dátt við hjá okkum, tá ið skiparin á Havhesti ringdi og bar okkum tey boð, at Mikkjal, sonur, beiggi, svágur og mammubeiggi, var dottin um umborð á Havhesti og fingið eina heilabløðing. Vit høvdu ilt við at skilja, at hann ikki skuldi vera saman við okkum meira. Men Gud, sum øllum ræður, veit hvat hann ger, vit skilja ikki hansara vegir, men vit kunnu bara seta alt álit í Harrans hond.

Mikkjal góði, tað er ein stórur saknur ikki at hava teg ímillum okkum meira. Tú var so spaklyntur, tá tú kom inn til okkara og heilsaði upp á mammu, sum hevur havt tvær heilabløðingar fyri nøkrum árum síðani.

Tú flutti inn til Hvannasunds at búgva fyri mongum árum síðan, har tú búði saman við mammu í kjallaranum hjá okkum, til tú keypti tær eini hús fyri 4 árum síðani, har tú búði sjálvur.

Lítið grunaði eg, at tá tú ringdi yvir til mín og bað meg koyra til til Dúgvuna, tú skuldi avstað við Havhesti, at tað skuldi verða seinasta ferð, eg skuldi siga tær farvæl.

Vit hugsa mangan um, hvussu tungt tað man hava verið hjá tykkum umborð á Havhesti í teirri sváru stund, tá tú Mikkjal so brádliga bleiv tikin frá okkum. Eina hjartans tøkk skulu tit eiga fyri tykkara roynd at halda honum á lívi til tyrlan kom.

Eisini ein hjartans tøkk til starvsfólkið á deild 8 á Landssjúkrahúsinum.

Hvíl í friði.

**Øll í húsinum, systir**

# Óluva Hansen



Ein heilsan til okkara høgt elskaðu mammu, sum sovnaði her úr fold annan sunnudagsmorgun í advent.

Vit systkini vilja altíð minnast teg, elskaða mamma, sum eina dýrabara mammu og eina megnarkvinnu. Nú ert tú farin heim til Harran, sum tú altíð minti okkum á at minnast og at lesa um og hevur tín trúgv sermerkt okkum øll.

Í aug., tá tú fylti 75 ár, fóru tú og babba uttanlands og aftur í okt., tá babba fylti. Hesar túrar vart tú so glað fyri og tosaði tú nógv um teir. Tú og babba vóru nógvar túrar saman og onkuntí eisini við bili, tit bæði høvdu tað gott saman og vóru altíð góð við hvønn annan.

Altíð ringdi tú at spyrja um, hvussu vit høvdu tað og spurdi eftir ommubørnunum, sum tú altíð nevndi við navni. Tú gloymdi ongantíð nakran og var altíð líka fitt og óføر til alt.

Fyri nøkrum árum síðani bleiv tú sjónveik og fór at arbeiða á blindastovninum. Har gekst tær væl at veva, tí hetta hveði tú ikki roynt fyrr. Mamma hevði vovið øllum ommudøtrunum toy til føroyskt skjúrt. Hetta er eitt serliga stórt minni at hava og ein serlig gáva frá tær mamma.

Á blindastovninum treivst tú ógvuliga væl og tú tosaði um, hvussu góð tey vóru við hvønn annan. Stovnurin var títt hjartamál, men tíverri eru nógv fólk har slóknað ta seinastu tíðina.

Nú er eitt stórt tómt pláss eftir teg, elskaða mamma, og ikki minst hjá tær, góði babba, sum var so serliga góður við mammu. Og ikki untist tykkum báðum ein serligan dag, sum skuldi verða um ein góðan mánaða.

Góði, elskaði babba, vit hugsa nógv um teg og má Gud vera hjá tær og styrkja teg í stóru sorgini.

Góða mamma, núr tín rødd tagnað og vit sita øll í stórari sorg. Men ein dag skulu vit møtast aftur, har bara gleði er.

Æra veri minnið um teg, elskaða mamma.

Heilsan,

**Ása, Kirstin,**
**John Ove, Marin,**
**Margith, Ann og Randi**




# Jólakonsert í Christianskirkjuni

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Komandi sunnudag verður tann árliga jólakonsertin hjá Klaksvíkar Hornorkestri. Hesin táttur varð tikin upp í 1965, tá bretin Norman Edwards var leiðari fyri orkestrið, og hevur hann óbrotin hildið sær síðani. At byrja við var tað bert Hornorkestrið, sum luttók, men seinni kom Klaksvíkar Sangfelag við, og í nógv ár luttóku trý kór: Klaksvíkskórið, Emmauskórið og KFUMkórið. Hesar konsertir hava verið sera væl vitjaðar, og hevur hetta verið eitt kærkomið avbroyti hjá fólki at hoyra hugnaligu jólaløgini spæld og sungin uppundir høgtíðina í hátíðarliga umhvørvinum, sum bert Christianskirkjan kann veita.

Í ár kemur, umframt Klaksvíkar Hornorkestur, eisini Klaksvíkskórið, stjórnað av Helgu Gerðalíð, at luttaka, og harafturat ein bólkur av blokkfloytunæmingum frá Klaksvíkar Tónlistaskúla.

Á skránni hjá Hornorkestrinum verða umframt tey traditionellu jólaløgini, Ave verum, Solemn Melody, Bless this House og Jerusalem. Hesi bæði seinastu verða við luttøku av sangarum. Klaksvíkskórið syngur, Eg rósu upp sá næla, Náttin var ágæt ein og Í dag er glatt í døprum hjørtum. Blokkfloytunæmingarnir spæla tríggjar føroyskar vetra- og jólasangir.

Fyrr hevur konsertin byrjað klokkan 20:30, men fólk hava hildið tað vera í so seint; so í ár er avgjørt at hava konsertina klokkan 20.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæra móðir, vermóðir, omma og langomma

**Jóhanna S. Joensen**
á Trønni, í Fuglafirði

andaðist í heiminum týsdagin 11. desember, 81 ára gomul.

Kistan fer frá heiminum í kirkjuna, hósdagin 13. desember kl. 17.00.

Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju fríggjadagin 14. desember kl. 13.00.
Sungið verður úr sálmabókini.

*Familjunnar vegna*

**Børnini**



Landsstýrispensjónirnar aftur til viðgerðar:

# Varisligar broytingar lagdar fyri tingið

**– Hetta uppskotið tekur tann ringasta ójavnan burtur millum pensjónirnar hjá landsstýrismonnum og løgtingsmonnum, sigur Anfinn Kallsberg, sum nú hevur lagt nýtt uppskot um pensjónirnar hjá landsstýrismonnum fyri tingið**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*



*- Eg havi gjørt mær ómak við at tosa við allar teir politisku flokkarnar, og uppskotið er eisini broytt fyri at ganga ynskjum hjá onkrum á møti, sigur løgmaður um nýggju broytingarnar til pensjónirnar hjá landsstýrismonnum*

Nú hevur Anfinn Kallsberg tikið stig til, at uppskotið um pensjónirnar hjá landsstýrismonnunum, sum var samtykt í tinginum fyri hálvum ári síðani, verður tikið av sama dag, sum tað skal koma í gildi.

Samstundis leggur løgmaður fram uppskot til broytingar í gomlu pensjónslógini frá 1993.

– Hetta verður gjørt fyri at beina burtur tann ringasta ójavnan, sum er millum landsstýrismenn og løgtingsmenn, men hetta uppskotið gevur als ikki landsstýrismonnum somu pensjónsviðurskifti, sum løgtingsmenn hava, sigur Anfinn Kallsberg.

Í broytingaruppskotinum verður mælt til, at ein serlig nevnd skal setast til at geva løgmanni tilmæli um lønar- og pensjónsviðurskifti hjá løgmanni og landsstýrismonnum. Løgmaður roknar við, at hendan nevndin fer at arbeiða fyri, at viðurskiftini hjá løgtingsmonnum og landsstýrismonnum verða javnstillað.

Munurin millum løgtingsmenn og landsstýrismenn kom av álvara í, tá løgtingið broytti pensjónirnar hjá løgtingsmonnunum í 1999.

### Broytingar koppaðu øllum

Tað var triðja dagin í mars mánaði í ár, at landsstýrið legði uppskotið um broyting í lógini um samsýning og eftirløn hjá landsstýrismonnum fyri løgtingið.

Endamálið við uppskotinum, sum landsstýrið legði fyri løgtingið, var at javnstilla pensjónsviðurskiftini hjá landsstýrismonnum og løgtingsmonnum. Undir viðgerðini í løgtinginum komu onkur broytingaruppskot, sum vórðu samtykt. Eitt av teimum var, at lógin varð sett í gildi aftur til 1951.

Eftir at uppskotið var samtykt í løgtinginum vaknaðu summir politikarar og fólk við kaldan dreym. Undirskriftir vóru savnaðir ímóti lógini, sum fólk hildu vera órímiliga, og flokkar hava ynskt, at lógin skuldi takast av, áðrenn hon kom at virka.

### Tað einasta rætta

Nú hevur løgmaður lagt nýtt broytingaruppskot fyri løgtingið, og her verður skotið upp, at broytingarnar skulu umfata løgmann og landstýrisfólk, sum tóku við í 1998.

– Løgtingið broytti pensjónirnar hjá løgtingsmonnum í 1999, og tað gav eisini sitandi løgtingsmonnum ágóðan. Tí er tað einasta rætta, at broytingarnar í pensjónunum hjá landsstýrismonnunum eisini umfata sitandi landsstýri, heldur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður sigur seg hava staðfest, at lítil og eingin undirtøka nú er fyri tí uppskotinum, sum varð samtykt í løgtinginum hálvum ári síðani, og tí leggur hann nýggja uppskotið fram.

Samstundis sum hetta uppskotið verður lagt fram, mælir løgmaður eisini til, at uppskotið, sum varð samtykt í mai mánaði í ár, verður sett úr gildi sama dag, sum tað kemur í gildi.

### Heldur seg fáa undirtøku

Anfinn Kallsberg roknar við, at undirtøka verður fyri nýggja uppskotinum hjá sær.

– Eg havi gjørt mær ómak við at tosa við allar teir politisku flokkarnar, og uppskotið er eisini broytt fyri at ganga ynskjum hjá onkrum á møti. Onkur flokkur hevur tó ikki havt hug at verið við í hesum arbeiði, sigur løgmaður.

Andstøðutingmaðurin Jenis av Rana stuðlar nýggja uppskotinum, og hann heldur, at tað hevði verið hykl, um løgtingsmenn noktaðu landsstýrismonnum at fáa somu pensjón sum teir.

– Eg helt, at tað var púra burturvið, at lógin skuldi fáa gildi aftur til 1951, men hetta nýggja uppskotið er í lagi. Tað rætta hevði verið, at uppskotið, sum varð samtykt fyrr í ár, bara var broytt soleiðis, at tað fekk gildi frá 1998, men tað er ivaleyst onkur annar flokkur, sum er ímóti tí, sigur Jenis av Rana, tingmaður fyri Miðflokkin.

# Hava leigað brunnbát úr Noregi

**Faroe Salmon hevur leigað ein brunnbát úr Noregi, so slaktið av fiskinum í Hvannasundi kann ganga skjótari. Tvey virki í Klaksvík arbeiða nú laksin**

ALIVINNA
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Faroe Salmon hevur sett meira ferð á slaktið av laksi úr ILA-rakta Hvannasundi. Alifelagið hevur leigað ein brunnbát úr Noregi, so teir nú hava tveir bátar, sum flyta fisk úr Hvannasundi og til Klaksvíkar, har tvey virki nú virka fiskin.

– Vit royna at bera so skjótt av sum gjørligt fyri at tøma allar teir 9 ringarnar, sum vit hava í Hvannasundi. Vit rokna at verða lidnir í februar mánaði, sigur Heini Gregersen, sum er annar av eigarunum av Faroe Salmon.

### Sjúkan ikki spreitt seg

ILA-sjúkan var staðfest í einum ringi hjá Faroe Salmon í Hvannasundi, og hesin ringurin er tømdur nú.

Átta aðrir ringar eru í umráðnum, og Faroe Salmon ætlar at taka allan hendan fiskin.

Eingin tekin eru um, at ILA hevur spreitt seg til nakran av hinum ringunum, men vandi er fyri, at hetta kann henda, og tí verður allur fiskurin tikin sum skjótast.

### Nógvur laksur

Faroe Salmon hevur um 900.000 laksar yvir fýra kilo í Hvannasundi, og allur hesin fiskur verður nú slaktaður.

Northern Fish Cold Storage tók ímóti laksinum úr smittaða ringinum, men nú arbeiða teir eisini fiskin á Eystlaks, har laksin hjá Faroe Salmon vanliga verður arbeiddur.

– Vit miðja eftir at taka góð 300 tons um vikuna, og vit hava leigað brunnbátin úr Noregi fram til februar mánaða, tá vit rokna við at vera lidnir við slaktið í Hvannasundi, sigur Heini Gregersen.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at okkara kæra mamma

**Anna Jensen**
**fødd Ellingsgaard**

andaðist á Landssjúkrahúsinum mikumorgunin 12. desember 89 ára gomul.

*Familjunnar vegna*

**Jákup og Annfinnur**

Tey, ið vilja minnast Onnu, kunnu lata Herberginum hjá Frelsunarherinum í Tórshavn eina gávu.

